# Spennandi torradagar í Klaksvík



*Torradagar verða hildnir á fyrsta sinni í Klaksvík*

**Í komandi viku verða serstakir torradagar í fiskivinnuhøvuðsstaði okkara, Klaksvík**

FISKIVINNA
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Við fyrilestrum, framsýningum og øðrum tiltøkum er endamálið enn einaferð at fokus á torran, sum er tann tíðin tá fiskur kemur inn á grunnarnar at gýta.

Ætlanin er at nýta alla komandi vikuna at skipa fyri ymiskum tiltøkum í Klaksvík, m.a. fyrilestrum um torra, torrafisk og torrahald.

Ætlanin er somuleiðis at skipa fyri kjakfundum millum framstandandi politikarar um fiskivinnuna í dag, og fáa serfrøðingar frá Fiskirannsóknarstovuni at greiða frá fiskivinnuni, sæð frá teirra eygum.

Eisini verður skipað fyri meira løttum undirhaldi í býnum við tónleiki og skemti. Virkishúsið, Bókasavnið, Leikalund og Atlantis skipa fyri serligum tiltøkum. Tiltøk verða eisini í KFUM&K, Snørisvirkinum, Klingruni, Svimjihøllini og Húsarhaldsskúlanum, Christianskirkjuni og umborð á Draganum, eins og Handilsfelagið skipar soleiðis fyri at handlarnir í býnum hava serlig tilboð á skránni.

Annars verður allur býurin merktur av hesum fyrstu torradøgunum.

Torratíðin á landi er vanliga friðarlig og tom eftir jólahalguna, varð hildið at tað hevði verið áhugavert at gjørt nakað serligt burturúr hesum tíðarskeiði, so sum tað var gjørt fyrr og so sum teir enn gera nógv burturúr í Íslandi.

Torri stavar annars frá gomlu tíðarrokningini. Hetta var navnið á mánaðinum, sum byrjaði fyrstu tendring eftir jól og vardi fram til næstu tendring.

Fyrstu tiltøkini byrja longu mánamorgunin kl. 10, tá ein framsýning við myndum og fiskireiðskapi letur upp í Leikalund.

# Hampiligt veður

**- Turt og sólarglottar verða um vikuskiftið, sigur veðurmaðurin, Petur Skeel Jacobsen**

VEÐUR
*Snorri Brend*

Tað verður av tí frægara veðrinum hetta vikuskiftið, lovar kendi veðurmaðurin.

– Vindurin verður lítil og eingin, staðfestir Petur.

Í morgin verður sama veðrið, tó verður nakað kaldari út á kvøldið. Men ongum nýtist kortini at óttast fyri hvítum avfalli.

Sunnudagin verður aftur lýggjari, samstundis sum hann veksur vindin nakað. Tað verður framvegis turt.

Mánadagin ætlar hann vindin nakað av landsynningi, men tað verður framvegis turt.

Týsdagin og mikudag verður hann sunnan og útsynningur í ættini, og kanska verður okkurt ælið. Hitin fer hesar dagarnar at liggja millum 6 og 10 stig.



*– Hampiligt veður um vikuskiftið, lovar Petur Skeel*










Synergi
Les meira um hesi spennandi skeið á www.synergi.fo ella ring 22RING (227464)